# Hoyringsskriv frá Føroya Sílaveiðifelag um uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil

Tórshavn tann 14. November 2025

Okkara áheitan er í tveimum, ein generell áheitan um at málið verður væl lýst, so tann besta loysnin verður, og ein serlig áheitan um at hava okkara seráhugamál, sílalívið og frítíðarfisking í huga tá avgerðin skal takast.

Aðrir náttúrufelagskapir lýsa sín seráhuga í málinum. Vit eiga øll at minnast til at náttúran er ein samanhangur millum ymiska lívið í henni, fisk, fugl, smákyktini í vátlendinum har vistskipanirnar eru.

## Eitt vælgrundað og fullfíggjað upplýsingargrundarlag áðrenn avgerðir vera tiknar

**Heimsins størsta verkætlan**, í mun til samfelagsbúskap og inntriv í náttúruna er fyri framman. Tað krevur serliga góða tilgongd, eitt fult upplýst grundarlag fyri at tryggja okkum øllum besta úrslitið tá samanum kemur.

Vit kenna okkum sannførd um, at leiðin í uppskoti, umvegis Djúpadal, ikki er tann rætta.

Tað tykist sum, at frontarnir eru trektir upp, og at tað gruggar málið. Kenslan er, at upplýsingargrundarlagið er ikki nóg gott, serliga tá náttúruni viðvíkur og hetta fáa vit ilt í búkin av satt at siga. Øll viðkomandi vitan, øll atlit eiga at verða verður tikin við soleiðis at tann besta leiðin til Suðuroyar verður tryggjað. Tað má ikki vera ein skjót politisk avgerð, men ein fakliga grundað og visioner avgerð.

Politiska skipanin eigur at endurskapa tryggleika og álit, soleiðis, at føroyingar saman finna eina loysn- suðuroyingar, sandoyingar, skúvoyingar,  náttúrufólk, ja, eina loysn, sum vit øll verða fegin um og erpin av.

## Tað er eitt mál í sær sjálvum at verja okkara villu náttúru

Villa náttúran í heimshøpi minkar við ræðandi ferð. Seinastu 50 árini er villa náttúran minkað frá umleið 70% til undir 40% (skógir, koralsker, fjallalendi o.s.fr.). Samstundis eru heili 73% av lívmarfeldinum horvið (djórum á sjógvi, í luftini, í vøtnum og á landi). Ikki bara er hetta eitt inntriv í heimsestetikkin, men eisini í sjálvt livigrundarlagið á fold.

Føroyar eru vælsignaðar við vakrari náttúru, har vit eisini orsakað av framburði missa náttúruna og eisini tað samband menniskju hava við náttúru, orsakað av broyttum vanum og tøkniligu innrásini.

## Sandoyggin er ein perla, sum nú stendur í vanda í mun til fleiri náttúrvirði og potentiali

Sandoyggin er náttúruperla við stórum vakstrarmøguleikum ímt ferðavinnu og náttúrutilfeingi.

Her eru fleiri vakstrar potentiali, sum landið átti gjørt eina visjón um, saman við øllum viðkomandi pørtum (kommunum, Visit Faroe Islands, áhugafelagskapum og almennum fakstovnum og granskingarumhvørvum). Grøna oyggin kundi gjørst ein sannur ein depil fyri alt virksemi, sum hevur við grønmeti at gera, bæði tá umræður dyrking men eisini landbúnaðarumsiting sum heild. Ein háskúlaoyggj, sum er grundað á serligu umstøðurnar, ikki minst økið í Djúpadali, við fokus á okkara tilfeingi til matna og upplivingar í náttúruni -  til dømis sílafisking.

## Árin í mun til sílalív og fisking

Síl í vøtn og áum eru partur av føroyska lívmargfeldinum, sum oftani verður gloymt í kjakinum.

**Sílaveiðifelagið er felagsskapur við tí endamáli, at hava spennandi upplivingar í nátturuni, og hevur tann grundarstein at varðveita, verja og tryggja sílamargfeldið í Føroyum**

Úr stovnandi fundinum í 1947 stendur hetta referat frá talu Sigmunds Petersen.

“Líka frá barni av hevði hann haft sera stóran áhuga fyri sílum, og sum smádrongur hevði hann fangað maðkapirrur í ánni, og helt hann, at tað átti at verða stovnað eitt felag her í Föroyum, sum kundi varðveita og nöra um sílini. Hann umröddi 1) útsetan av laksayngli á Sandi, Saksun og Skálabotni og möguligt onnur stöð, 2) sílarogn, sum verða tikin við eyri úr áunum um heystarnar og tí var skaðiligt fyri sílabestandin, 3) nótakasti fyri áunum, 4) arbeiðið í summar á Kaldbaksvötnunum, 5) Leynavatn og tey smáu sílini har, 6) matnaviðurskiftini á vötnunum”

Føroya Sílaveiðifelag (FSVF) hevur umframt, at fremja umstøður at fiska, eisini havt aðrar týdningamiklar uppgávur, til dømis at ráðgeva og luttaka í fyrstu stigunum at stovna alivinnu í Føroyum. At vit yvirhøvur hava eina alivinnu er m.a. eitt úrslit av, at mann hevur havt eitt livandi og ríkt umhvørvi við áhuga fyri fiski, har hugurin at menna hevur havt góðar umstøður. Eitt umhvørvi við har fólk koma saman um at læra meira, verja og menna. Eitt tílíkt umhvørvi hevur alstóran týdning, eigur at stimbrast, ikki skeiklast. Eisini tí metir FSVF tað verða harmiligt, at lógaruppskotið til hoyringar ger seg inn á fleiri av teimum fáu vøtnunum sum hava týdning fyri FSVF.



Sílaveiðufelagið - Steingrim Nielsen, Sigmund Petersen og Torry Niclasen - er eftir livfiski úr alibrúkinum hjá Just. Johan Lervig er komin at fregnast. Villur fiskur varð veiddur og gekk síðan saman við fiskinum hjá Just

**FSVF er í holtur við endurreisn við íblástri úr Íslandi, Danmark og aðrastaðni**
Í hesum londum gongur aftur, at mann vil aftur til náttúruna, at taka ferðslu og vinnulig inntriv burtur sum órógva, at endurbyggja villa náttúru.

Tað eru mong dømi um, at stórar infrakervisverkætlanir hava dripið lívið í vatnskipanum av óvart, tí tað er trupult at forða fyri dálking ísv vega- og tunnilsgerð tætt við áir og løkir. At man hevur gjørt inntriv uttan at hugsa seg um, og mann roynir nú at bakka.

Ætlanin nú er at styrkja sílaútsetingina og at arbeiða við betri náttúrligum áum og umstøðum.

Ein partur av hesari stigbýttu ætlan er at kanna føroysku sílini betur - sjósil, vatnasíl og villaks og umstøðurnar hjá hesum fiski í ósum, áum og vøtnum. Og at kanna, hvussu mann best leggur til rættis, so stovnarnir kunnu trívast best, til fragd fyri børn og ung, frítíðarfiskarar, ferðafólk og mong onnur. Hetta arbeiði fer at taka nøkur ár, áðrenn mann hevur fult yvirblikk.

At gera økið kring Sandsbygd og millum vøtnini til eitt byggipláss, og seinni eina ferðsluhøvuðsæðr forkemur ein týdningamiklan lið í hesum menningarætlanum.

**Lítlavatn og Stóravatn eru sílavøtn í einari heilt serstakari náttúru**
Hvørjar fylgjur eru fyri sílalív í Stóra- og Lítlavatni, er ikki lýst, og verður nú lýst yvirskipað av Føroya Sílaveiðifelag, sum part av endurreisingarætlanini.

**Sandsvatn, áin og sandurin er tiltikið sílastað og er miðdepil í framtíðarætlanunum hjá Føroya Sílaveiðifelag**
Her standa sílafiskarar  í friði og  fiska fram við vatninum. Hesir koma at missa tað nærveru við náttúruna, tá landsvegur við nógvari og tungari ferðslu púra broytir sæluna. Vit kenna heldur ikki hvussu vegarbeiðið annars kemur at ávirka sílalívið. Men vit vita, at grót- og plastpartiklar ávirka.
Óansæð um tað verður spreinging ella boring, so verður nakað av grótinum knúst til fínar partiklar. Partiklarnar renna frá grótinum við regni og vindi. Í ringasta føri kunnu partiklarnir førast út í Stóravatn og leggjast á botnin, og harvið ávirka botndjóralívið og fiskalívið.

Umráðandi er, at staðsetingin av gróthópinum verður gjørd soleiðis, at tað hevur minst møguliga ávirkan á áir og vøtn í økinum. Vit hava ikki funnið nágreiniliga lýsingar um, hvar í Djúpadali gróthópurin er ætlaður at liggja, men tað tykist rættiliga sannlíkt, at stórar grótrúgvur enda á økinum millum Stóravatn og Lítlavatn fyri at avmarka flutningskostnaðin.

Umframt plastpartiklar frá spreinging kemur eisini sera nógv mikroplast frá bildekkum. At leggja ein veg við nógvari ferðslu tætt við vøtnini kemur uttan iva at ávirka vøtnini og fiskin í vøtnunum sum upptaka mikroplast. Hetta er skaðiligt bæði fyri botndjóralívið og fískalívið.

**Føroyar sum ferðavinnuland – sílafisking stórt potentiali**
Frítíðarfisking í serstakari náttúru eitt serligt virði, sum nú kann skeiklast.
Føroyar er eitt potentielt sílaferðamál í framtíðini, júst tí vit hava eina so serstaka friðsæla náttúru at koma út í.  Vøtnini á Sandi eru ein gimsteinur í hesum Føroya ríkidømi.
Enn manglar lóggáva og regulering og prísmodellir fyri, hvussu man tekur pening fyri fisking á vøtnum til gagns fyri jarðareigarar. Td í Íslandi, Danmark og Noregi er hetta vorðið virðismikið íkast til jarðareigarar. Tað er týdningamikið at fáa skipaði viðurskifti, og endurreisingarætlanin hjá FSVF fevnir eisini um hetta mál.

Grundvøllurin er náttúran har alt hendir. Vit seta ein týdningamiklan part av hesum í vanda við uppskotinum um løgtingslóg um Suðuroyartunnil.

Við hávirðing og við vón um jaliga móttøku

Føroya Sílaveiðifelag